Strandferðslan sóknast eftir

# roknskaparfólk/ controller

Av tí at okkara virkandi fíggjarleiðari – og annars roknskaparfólk/controllari á Fíggjardeildini – hevur sagt seg úr starvi, verður starvið sum roknskaparfólk/controllari lýst leyst til at seta skjótast gjørligt.

sansir.fo

**Starvið**
Høvuðsuppgávan hjá roknskaparfólkinum/controllaranum er at menna fíggjarstýringina á SSL og at halda fast við menningina, ið hevur verið seinastu árini. Aðrar uppgávur eru:
- Játtanareftirlit (samlað og fyri rakstrarstað)
- Uppseting og viðlíkahald av mannagongdum
- Játtanarlig og roknskaparlig ráðgeving til deildarleiðarar
- Uppseting av hagtølum
- Ad-hoc lýsingar

**Førleikakrøv**
Vit vænta, at tú hevur:
- hevur HA, HD, HH ella líknandi próvg
- hevur royndir innan bókhald, grannskoðan e.l.
- er hollur teldubrúkari
- hevur kunnleika og royndir í Navision-fíggjarstýringsskipanini og Microsoft Office forritunum
- hevur kunnleika til LøttLøn-lønarskipanina
- kanst arbeiða sjálvstøðugt og hevur lætt við at samstarva
- hevur góð evni at orða teg bæði skrivliga og munnliga
- hevur góðan røkjuskap

Talan er um eitt starv við stórum og spennandi avbjóðingum, har ið tað stundum kann verða talan um átrokandi uppgávur. Samstundis fært tú tó møguleika fyri at skipa starvið sjálvstøðugt út frá givnu karmunum.

**Fíggjardeildin**
Høvuðsuppgávan hjá Fíggjardeildini er at veita leiðsluni eina úrslitagóða búskaparfyrisiting, herundir samskipa, viðlíkahalda og menna fíggjarstýringina hjá fyritøkuni. Aðrar uppgávur eru:
- Fyriskiping av roknskaparverkinum
- Uppseting av fíggjarætlanum
- Játtanareftirlit
- Roknskaparlig skráseting
- Roknskaparframløga
- Innkeyps- og goymslustýring
- Lønarfyrisiting

**Setanartreytir**
Starvið verður sett sambært sáttmála millum Fíggjarmálaráðið og Starvsmannafelagið, og er lønt í 6. lønarflokki.
Arbeiðsstaðurin er í løtuni Yviri við Strond 4 í Tórshavn. Frá 1. januar 2008 er arbeiðsstaðurin á Tvøroyri.

**Umsóknir**
Umsókn við próvskjølum skal sendast til:

Strandfaraskip Landsins
Stílað: Starvsfólkadeildin
Boks 88
FO-110 Tórshavn

og skal vera fyritøkuni í hendi í seinasta lagi 26. mars 2007 kl. 12.00. Til ber eisini at senda umsóknina til t-postadressuna: pah@ssl.fo.

Um tú ynskir nærri upplýsingar, kanst tú ringja til Jógvan Rubeksen, virkandi fíggjarleiðara ella Niels Juel Arge, virkandi stjóra á tlf. 343000 ella senda t-post: jor@ssl.fo ella nja@ssl.fo

Strandfaraskip Landsins er ein landsfyritøka undir Innlendismálaráðnum, og hevur sum endamál at lúka landsins tørv á innanlands fólka- og farmaflutningi. Fyritøkan umsitur 29 farleiðir (22 Bygdaleiðir og 7 Oyggjaleiðir). Talið á flutningsanleggum eru 40 bussar og 8 ferjur. Samlaða talið á starvsfólkum á SSL svarar til 120 ársverk.

STRANDFARASKIP LANDSINS

